


# PostTøkan

– nýggj tænasta frá Postverki Føroya

**PostTøkan hevur eisini opið uttan fyri vanliga upplatingartíð – gerandisdagar frá 8 til 21 og leygardagar frá 10 til 16**

Posttøkurnar eru sum lítil posthús, har tú kanst avgreiða flestøll vanlig postørindi – alt frá at senda brøv og pakkar til at keypa frímerki, bjálvar og postkort.

### Við PostTøkuni kanst tú:

» Máta og viga brøv og pakkar
» Keypa frímerki og bjálvar
» Senda brøv og pakkar innanlands og uttanlands
» Finna tín pakka (Track&Trace)
» Rinda við gjaldkorti og fáa kvittan fyri títt keyp

Nýggja posttøkan stendur í inngongini á posthúsinum í Klaksvík og Saltangará, í nýggju postbokshølunum í Miðbýnum í Havn, umframt á Óðinshædd. Fyrstu dagarnar verður fólk frá Postverkinum á staðnum til at vegleiða, um tær tørvar hjálp.

*Postverk Føroya gleðir seg at veita nýggju tænastuna og vónar, at hon verður ein góður lutur í tínum gerandisdegi.*




**PostTøkan frankerar á staðnum – og gevur neyva frankering til brævið**

Postverk Føroya

SENDISTOVAN



# KT-leiðari til Postverk Føroya

Postverk Føroya sóknast eftir einum dugnaligum KT-leiðara við drúgvum royndum innan KT-økið.

Postverk Føroya er í ferð við at leggja um alt sítt virksemi í strembanini eftir at gerast millum mest framkomnu post-fyritøkur í okkara parti av heiminum. Í tí høpi eru vit í ferð við at dagføra og menna alt okkara KT-kervi. Vit hava sett okkum fyri, at KT skal nýtast offensivt – bæði í umsitingini og í tænastuveitingini.

Nýggja KT-kervið er grundað á Microsoft Navision, sum vit nýta, har tað loysir seg. KT-leiðarin, sum hevur roynd frá einum Microsoft Navision KT-umhvørvi, fær sentralan lut í virksmenningini av Postverki Føroya.

**Vit sóknast tí eftir einum KT-leiðara, ið er før/ur fyri:**

- at geva sítt íkast til eina skilagóða KT-strategi
- at kortleggja og fremja tær verkætlanir, ið skulu til, at røkka settu málini
- at skipa KT-raksturin á ein hátt, so brúkarar og kundar føla seg tryggar
- at samskifta við veitarar uttanlands og í Føroyum
- og mangt annað...

**Vit rokna við, at tú hevur:**

- hóskandi útbúgving og drúgvar royndir innan KT
- kunnleika til Best Practice innan nýtslu av KT-standardskipanum
- kunnleika til netskipanir
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- góð samstarvs- og samskiftisevni

Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi og fjøltáttað starv í einum jaligum umhvørvi. Útbúgvingarmøguleikar og neyðug skeið eru ein sjálvfylgja, og so fært tú eina kappingarføra løn.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum og ummælum skal sendast til:

Postverk Føroya
starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
marry@postverk.fo

og vera okkum í hendi í seinasta lagi hin **16.03.09**

**Spurningar**
Vil tú vera við til at dríva eina áhugaverda virkismenning, so send okkum ein teldupost á postverk@postverk.fo. Tú kanst eisini ringja til Vivi Egholm, figgjarstjóra, á 21 31 93 ella til Sofus Clementsen, stjóra á tlf. 23 61 31.

Stutt um Postverk Føroya
245 fólk starvast hjá P/F Postverki Føroya. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn. Saman við samstarvsfelagum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

post.fo